# Løgtingsformaðurin í Álandi



*Álendska Lagtinget er karmur um vitjanina há Edmundi Joensen, løgtingsformanni, í Álandi um vikuskiftið*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Hósdagin fór løgtingsformaðurin til Álands, har hann skal vitja formannin i álendska løgtinginum**

VITJAN

Edmund Joensen, løgtingsformaður, er um vikuskiftið á stuttari vitjan í Álandi. Hann er boðin av starvsfelaga sínum, álendska løgtingsformanninum at tosa um samstarv.

Edmund Joensen segði, tá Sosialurin hitti hann á flogvøllinum á veg avstað, at hann fer at tosa við formannin í álendska Lagtinget, sum tingið har eitur, um samstarv millum hesi bæði tingini. Okkara Løgting og teirra Lagting. Vitjanin verður stutt, segði hann. Hann verður longu aftur mánadagin.

Sum skiltist á Edmundi Joensen, løgtingsformanni, fóru teir báðir løgtingsformenninir at tosa um eit samstarv, sum kanska kann fara at líkjast tí, sum er millum tingini í Útnorði.

**ej**

# Fara at merkja grind í summar

**Grindamerkingar eru nú aftur á skránni. Úgerðin er klár, og bíðað verður nú bara eftir ein samstarvshugaðari grind, at luttaka í verkætlanini**

GRINDAKANNING

Aftur í ár verður ligið framvið at sleppa at merkja grind. Útgerðin er tøk. Bæði tann at seta á hvalirnar, og fylgisveinatíðin, sum umbiðin er til sendararnar, ið settir verða á hvalirnar.

Dorethe Bloch, professari, stendur enn sum áður í fremstu røð, tá grind er undir landi. Og hon vil fegin frætta um allar grindir, sum hildnar verða til.

Er talan um eina lítla grind – tað eru tær, sum best eru egnaðar til merking, sigur hon – høvdu tey á Náttúrugripasavninum fegin vilja fingið fráboðan sum skjótast, so merkjast kann.

Tó er tað so, sigur hon, at vanliga vilja grindamenn hava eina grind at leggja beinini fyrst, áðrenn teir fara at hugsa um merking. Spikíløtuni og ikki minst tær turru lykkjurnar telja hjá mongum meira enn ein fylgisveinasendari, sum boltaður verður á hornið á einum hvali.

Ein onnur verkætlan, sum er í gongd í løtuni, er stóra springarakanningin, sum nú hevur vart eina tíð. Hon heldur fram, og Dorete Bloch vil fegin frætta um allar springarar, sum hildnir verða til í landinum, sigur hon.



*Allir springarar, sum leggja beinini í Føroyum, verða gjølla kannaðir av vísindafólki við Dorete Bloch á odda*
*Mynd: Edvard Joensen*



*Eitt upplivilsi á túrinum undir Sørvágsbjørgunum fyri sunnan er at fara inn á Seyð(a)skorargjógv, har veldugt helli er innanfyri fossin, sum rennur í gjónni í erva*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Fram við landi við sørvingum

**Nýggja ferðavinnufyritøkan Blue-gate í Sørvági ger útferðir við báti fram við landi, eins og eisini verður skipað fyri gonguferðum á fjøllunum**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

**Sørvági:** Í vikuni var Sosialurin eina rundferð við ferðamannabátinum Skarvi úr Sørvági, sum í summar fer at sigla við ferðafólki undir Sørvágsbjørgunum sunnantil, eins og farið verður til Mykinesar ella norður á Víkar, um líkindini laga seg soleiðis. Størri frásøgn frá túrinum kemur í seinni blað.

Tað eru Birgir Hansen og Hans Poulsen, sum eru menninir aftan fyri Bluegate. Teir eru nýliga byrjaðir við hesum virkseminum. 33 fót glastrevjabáturin Skarvur er riggaður um til at sigla við ferðafólki um summarið. Birgir er staðkendur allastaðni og verður hann, sum í stóran mun fer at standa fyri siglingini.

Umframt siglitúrarnar fara teir eisini at skipa fyri gongutúrum á landi. Til tess hava teir fingið tann við tíðini »legendariska« Høgna Nielsen at vera ferðaleiðara. Tey flestu, sum eitt nú hava verið í Gásadali við gonguliði, kenna Høgna og ivaleyst eisini fleiri av hansara góðu søgum.

Tað ber eisini til at leiga sær Skarv ein túr við tráðuni. Møguleikar fyri at fiska eru góðir á Sørvágsfirði og ytri á eisini, um tað skuldi verið, og útgerðin er umborð. Bæði tráður og snellur.

Vanligu siglitúrarnir, sum gjørdir verða, fara væntandi at liggja um hálvantriðja tíma, sigur Birgir Hansen. Ætlanin er at gera tríggjar túrar dagliga. Farið verður klokkan 10 fyrrapart. Klokkan 14 seinnapart, og so er eisini ætlanin at gera ein kvøldtúr. Kostnaðurin verður 250,- krónur fyri hvønn luttakara.

# Úr Eiðis søgu

Í bókaummæli, sum var í blaðnum ðí gjár, varð líkasum lagt upp til, at tað var rættlesarin, sum í ávísum hevði brúkt suðuroyarmál í tekstinum í bókini Úr Eiðis søgu.

Rættlesarin hevur gjørt vart við, at soleiðis er ikki. Hann sigur í viðmerking við Sosialin, at einki er broytt av tí orðalagi, høvundurin hevur skrivað.

Høvundurin, sum var hálvur suðringur, hevur, hóast hann var uppvaksin og altíð búði á Eiði, brúkt orðingar í skriftmáli sínum, sum beinleiðis eru tiknar úr suðuroyarmáli.

Nevnt varð, at har eiðisfók siga »bæði«, varð skrivað »báði«, sum er suðuroyarvending. Men soleiðis hevur høvundurin skrivað tað, og tað er brúkt soleiðis í bókini, sigur rættlesarin í viðmerking.

Vit umbera hetta mistak okkara.

**blðm.**

# Avlop hjá Realinum

**Realkreditstovnurin hevði í seinasta roknskaparári eitt avlop upp á hálvaellivtu millión krónur eftir skatt. Níggju lániumsóknir vórðu ikki játtaðar**

FÍGGING

Føroya Realkreditstovnur hevði tíggju og eina hálva milión krónur í avlopi seinasta roknaskaparár, eftir at góð hálvtriðja millión er sett av til skatt. Eftirstøðurnar av terminsgjøldum vóru tvær milliónir, tá roknskaparárið endaði, stendur í ársfrágreiðingini hjá Realinum.

Realurin játtaði seinasta roknskaparár lán upp á umleið 75 milliónir krónur. Tað komu 23 umsóknir um lán til stovnin. Talan er um umsóknir um fígging í samband við eigarskifti og umfígging. 14 av hesum 23 úmsóknunum vórðu játtaðar, men hinar níggju fingu noktandi svar.

Realkreditstovnurin sigur í ársfrágreiðing síni, at vøksturin í játtanunum var ikki so stórur, sum væntað varð frammanundan. Eisini verður sagt, at trupulleikar í rækju- og alivinnuni hava borið í sær, at óvanliga nógv lán eru afturgoldin í úrtíð. Talan er um 4 lán upp á tilsamans 91,8 milliónir, sigur Realurin.

Í roknskaparárinum er eitt pant farið til tvingsilssølu. Tað kostaði Real-kredittinum 17 milliónir í tapi, stendur í ársfrágrieðingini hjá stovninum.

Í eykagrunnunum hjá stovnunum vóru, tá roknskaparárið endaði, 72,5 milliónir, sum svara til 82,3 prosent av samlaðu láni-skuld stovnsins. Samlaða eginongnin var 562,5 milliónir krónur.

Roknaskaparárið hjá Føroya Realkreditstovni er frá 1. apríl til 31 mars.

**ej**



Tommy til Kairo:

# Umhvørvisumsitingin skal miðspjaðast

**Í august mánaði gongur leiðin hjá Tommy Petersen, ráðgeva í oljufyrisitingini, til Kairo í Egyptalandi, har hann skal virka sum ráðgevi í umhvørvisumsitingin i. Hetta er í sambandi við, at roynt verður at miðspjaða umsitingina**

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Í august mánaði í ár gongur leiðin hjá Tommy Petersen, ráðgeva í oljufyrisitingini, aftur í útlandið at arbeiða. Hesuferð fer hann til Egyptaland at arbeiða tvey tey komandi árini, har hann skal virka sum ráðgevi hjá leiðsluni í umhvørvisstýrinum í Kairo*
*Savnsmynd*

Tommy Petersen fer nú aftur í útlandið at arbeiða. Fyri tveimum árum síðani kom hann heim úr Nepal eftir at hava arbeitt har í trý ár. Nú gongur leiðin til Egyptaland, har hann skal arbeiða sum ráðgevi í umhvørvisumsitingini í Kairo tvey tey komandi árini.

Tommy er sera spentur til hesa uppgávuna, og gleðir hann seg til hann skal avstað.

### Miðspjaðing

Tommy hevur nógvar royndir í at arbeiða innan ymiskar umsitingar. Bæði í Føroyum og uttanlanda. Hetta millum annað gjørdi, at hann fekk hetta spennandi starvið í Kairo.

Egyptarar hava í eitt ára tíggju nú arbeitt við eini ætlan um at miðspjaða umhvørvisumsitingina, og er har, sum Tommy skal virka sum ein ráðgevi.

– Eg komi at arbeiða í miðumsitingini, har eg skal hjálpa myndugleikunum við ætlanunum hjá teimum, greiðir hann frá.

Hetta er øvugt av tí, sum hann arbeiddi við í Nepal. Tá arbeiddi hann eisini yvirhøvur við at miðspjaða umsitingar. Ikki bert á einum øki, men sum heild.

– Tá sat eg úti í lokaløkinum og arbeiddi við at fáa umsitingar út í økini, meðan eg fari at sita í miðøkinum í Egyptalandi, sigur Tommy Petersen.

Sostatt er hetta eisini eitt meiri málrættað øki, sum Tommy kemur at arbeiða innan komandi tvey árini.

Tommy greiðir frá, at fólkið í økinum har um leiðir er vælútbúgvið. Men tey eru bara ikki so von við hetta, at umsitingar virka sum tænastudeplar. Heldur eru tey von við, at umsitingar eru meira stýrandi. Og eisini hetta fer hann at arbeiða við at broyta.

– Vit koma at stuðla teimum í teirru stremban eftir, hvussu slíkar umsitingar kunnu fáast út í lokaløkini, og at tær veruliga kunnu vera meiri tænastusinnaðar, enn tey eru von við, sigur hann.

### Royndur maður

Stjórnin í Egyptalandi hevur gjørt eina ætlan um, hvat tey ætla við hesum. Í eitt áramál hava danskir serfrøðingar verið í landinum og gjørt uppskot um, hvussu gerast kann fyri at fáa hesar umsitingarnar út í økini.

Orsøkin til, at tað júst eru danir, er, at tað er við hjálp frá Danida felagsskapinum, at hetta verður gjørt.

Tommy Petersen hevur fingið at vita, at hann fekk starvið, tí at hann varð mettur at vera ein maður við nógvum og fjølbroyttum royndum innan hesa starvsleiðina.

Fyri tað fyrsta, at hann hevur arbeitt við miðspjaðing frammanundan og eisini har um leiðir.

– Tey hava sum sagt havt serfrøðingar har. Nú vilja tey so hava fólk til arbeiðis, sum sum heild vita nakað um umsitingar, greiðir Tommy frá.

Og ikki kann annað sigast enn, at Tommy hevur drúgvar og nógvar royndir. Tey trý árini í Nepal hava uttan iva talt nógv, og tað at hann yvirhøvur veit nógv um miðspjaðing eisini.

Umframt hetta, so hevur hann arbeitt í fleiri ymiskum umsitingarligum størvum í Føroyum, og er hann vanur at arbeiða í altjóða umhvørvi. Eitt nú var eitt skifti í Irak, har hann tókst við lokalumsiting og miðspjaðing eisini.

Sjálvur lýsir Tommy seg hálvavegna sum ein sparringspartnara í hesum førinum.

– Eg trúgvi, at tey helst vilja hava fólk, sum á einum persónligum plani hava áhuga fyri hesum. Fólk, sum eru búgvin og helst á mínum aldri, sigur Tommy.

### Teirra skipan

Tommy leggur dent á, at hann ikki skal niður har at innføra nakra føroyska ella danska skipan. Har er ein skipan, sum nú er, og ein ætlan fyriliggur um, hvussu egyptiska stjórnin sær fyri sær, at hetta skal fara at virka. So er uppgávan at gera hetta til veruleika. Og har er tað, at Tommy Petersen kemur at virka sum ein ráðgevi hjá leiðsluni í umhvørvisumsitingini í Kairo.

Sosialurin ynskir Tommy góða ferð og góða eydnu í Egyptalandi.

## Eingin príslækking

Seinastu mánaðirnar er prísurin á olju øktur munandi. Oljuprísurin liggur í dag um slakar 40 dollarar fyri tunnuna, og hetta væl hægri enn bert fyri nøkrum árum síðan, tá prísurin var um 25-30 dollarar fyri tunnuna.

Høvuðsorsøkin til stóru príshækkingina seinastu mánaðirnar er óttin fyri yvirgangsálopum á lond í miðeystri, ið framleiða olju. Seinastu tíðina hevur verið tutla í krókunum um, at oljuframleiðandi londini í OPEC-samstarvinum hava sett sær fyri at lækka prísin aftur.

Á OPEC-fundi hósdagin í Beirut avráddu oljuframleiðandi londini at økja um oljuframleiðsluna, men økta framleiðslan hevur ikki í fyrstu syftu lækkað høga prísin. Sambært Ritzau lá oljuprísurin hósdagin framvegis um 39 dollarar fyri tunnuna.

**páll**

## Kunningarblaðið Pisan frá MFS komið

Árliga útgávan av studentablaðnum Pisuni, hjá MFS er nú úkomið.

Hetta er eitt blað við ymiskum upplýsninum til teirra, ið ætla sær undir víðari lesna. Bæði praktisk, sosial og fíggjarlig viðurskifti verða viðgjørd, hesuferð verður eisini nógv tilfar um lesna uttanfyri Danmark og Norðurlond.

Til ber at lesa m.a. persónligar frágreiðingar frá føroyskum lesandi, sum eru stødd ymsastaðni runt í heiminum, yvirlit yvir hentar heimasíður, lærustovnar, bústaðarávísingar o.m.a.

Til ber at fáa blaðið á miðnámsskúlunum, bókasøvnum og á lestrarvegleiðingum kring landið, umfram á skrivstovunum hjá MFS í Keypmannahavn og Århus.

**eys**

## Havnar Jazz Festival skjótt av bakkastokki

28. juni til 04. Juli verður aftur jazz festivalur í Havnini. Hesuferð siga fyrireikararnir tó, at skráin verður sera spennandi og nakað øðrvísi enn undanfarin ár. Tað verða nógv útlendsk nøvn at hoyra, eins og føroyingarnir eisini fáa møguleika at vísa síni kynstur.

Tónleikurin, ið verður spældur verður jazzur úr øllum Europa, poppur, rockur, vísusangur, fólkatónleikur, diskotónleikur o.m.a.

Fyrireikararnir halda hetta vera ein frálíkan møguleika hjá føroyingum at vísa umheiminum okkara serstøku mentan og okkara ríka tónleikalív.

**Fáir stuðlar**

Eitt, sum hevur undrað fyrireikararnar stórliga, er hvussu lítlan áhuga tiltakið vísir seg at hava ímillum fyritøkur og handlar. Tey eru ógvuliga fá, ið hava nýtt høvið at stuðlað tiltakinum og harvið at fingið lýsingar, sum verða sæddar av mongum.

Fyrireikararnir meta, at hetta ikki bert er eitt tónleikatiltak, men samstundis eisini eitt stórt átak fyri ferðavinnuna. Ein góður sýnisgluggi til útheimin.

Men hóast vantandi fíggjarliga stuðulin, er skráin nú næstan komin undir land. Í næstum verður farið undir atgongumerkjasøluna.

**eys**



